

# Fleiri og fleiri á café

Systrarnar Joan Mikkelsen og Súsan Johannesen hava latið nýggja kafé upp á Toftum. Kafé'in, sum nú hevur verið opin í eina tíð, hevur fingið navnið Café´in í Hópinum, og hon liggur beint omanfyri havnalagið á Toftum. Í hugnaligu hølunum, sum eru í tveimum hæddum, er møguleiki hjá fólki at keypa sær kaffi, the og køku. Til matna kunnu eisini keypast rundstykki, pylsur, smá pizza-petti og ísur. Pláss er fyri 45 fólkum í Café´ini í Hópinum, og sagt verður, at talið av vitjandi er vaksið, sum dagarnir eru gingnir síðan upplating.

# broytist lítið



*Seinnu yvirlitstrolingarnar hjá Magnusi Heinason vísa, at støðan hjá toskinum á landgrunninum broytist lítið*
*Mynd: Røgvi K. Mouritsen*

var mettur at vera so lítil sum í løtuni.

Hann sigur, at uppi í talinum 20.000 tons er ikki bara sjálvur gýtingarstovnurin, men toskurin á landgrunninum sum heild, bæði tann gýtingarføri og ungi fiskurin.

- At toskastovnurin á landgrunninum er á so lágum støði, kemur at avmarka seg sjálvt – á tann hátt, at hóast náttúruviðurskiftini eru positiv, er avmarkað, hvussu stór veiðan kann gerast við verandi toskastovni.

Petur Steingrund sigur, at tað skal ein ávís nøgd av toski vera í havinum, fyri at hetta skal síggjast aftur í veiðini – sjálvt um náttúran er við okkum okkurt einstakt ár.

### Nøgdin týdning

- Í løtuni er ikki nóg mikið bara við góðum náttúruviðurskiftum, tí tilgongdin er eisini tengd av, hvussu nógvur toskur er í sjónum, leggur hann aftrat.

Fiskifrøðingurin sker út í papp og sigur, at tað í fyrsta lagi eru tvey ting, sum skulu til fyri at fáa góða toskaveiði – góð náttúruviðurskifti og tað, at nógvur toskur eru í sjónum.



*Gýtingin hjá toski hevur verið góð, men samlaða nøgdin av toski á landgrunninum er søguliga lítil*

# Smáfiskurin má sleppa at veksa á landgrunninum

**- Tað er umráðandi, at smáfiskurin fær frið at veksa, so toskastovnurin kann koma fyri seg aftur, nú hann er so lítil sum ongantíð áður, sigur Fiskirannsóknarstovan**

FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Við tí stóra veiðitrýsti, sum er undir Føroyum, vil tilgongdin av ungfiski tey einstøku árini í stóran mun gera av, hvussu stórur stovnurin er. Av tí sama er stórur partur av stovninum ungur fiskur. Bæði stovnur og veiða vilja vera skiftandi ár undan ári, tí tilgongdin er skiftandi.

Tað sigur Fiskirannsóknarstovan í seinastu frágreiðing síni um fyrru yvirlitstrolingarnar á landgrunninum í vár.

Stovnurin sigur, at vøksturin á fiskinum sjálvandi eisini hevur týdning fyri, hvussu stór stovnsvektin er.

- Í yvirlitstrolingunum í vár vóru toskur og hýsa hampiliga væl fyri, meðan upsin yvirhøvur var rakari.

### Broyttist skjótt

Í somu frágreiðing um yvirlitstrolingarnar í vár, vísir Fiskirannsóknarstovan á, hvussu gongdin var tíðliga í nítiárunum, og hon kann ikki samanberast við gongdina í løtuni.

Stovnurin sigur, at eftir sera vánaligu fiskiárini fyrst í nítiárunum, komu bæði toska-og hýsustovnurin ógvuliga skjótt fyri seg aftur.

- Orsøkin var teir sera góðu árgangirnir av toski í 1992 og 1993 og hýsuárgangirnir í 1993 og 1994, sum skaraðu fram úr.

### Aftur minking

Í fleiri ár høvdu vit góða fiskiveiði, men síðan ár 2002 er toskastovnurin nógv minkaður aftur.

- Hóast úrslitið fyri tosk í 2008 er nærum tvífalt so stórt sum í 2006 og 2007, er stovnurin enn á sera lágum støði, og tí hevur toskastovnurin eisini alla vernd fyri neyðini.

Fiskirannsóknarstovan sigur, at nú kanningar vísa, at gýtingin hjá toski hevur verið góð, er ógvuliga umráðandi, at smáfiskurin fær frið at veksa, so toskastovnurin kann koma fyri seg aftur.